

Mynd: BP

# Orkutørvurin økir ein triðing komandi 25 árini

**Jógvan Hugo Gardar**

10.11.2015 - 09:37

Oljan.fo

Altjóða orkustovnurin (IEA) sigur í eini nýggjari meting at heimsins orkutørvur komandi 25 árini kemur at økja við einum triðingi, samanborið við í dag. Samstundis verður sagt frá IEA at oljuprísurin spakuliga kemur at hækka til 80 dollarar í 2020.

Tað er í síni árligu fráðgreiðing, Worl Energy Outlook, at IEA kemur við niðurstøðunum. Greiningin hjá teimum vísir at orkutørvurin í ríkastu londunum kemur at minka komandi 25 árini. ES kemur at minka um sína orkunýtsku við 25 prosentum fram til 2040; Japan minkar sín orkutørv við 12 prosentum, meðan USA bara minkar um sína nýtslu við trimumprosentum.